ítróttur

Nr. 17 • týsdagur • 24. januar 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

# Tey fremstu sigldu millum skerini

**Oddaliðini í fótbóltskappingini í fjør sluppu undan hvørjum øðrum í lutakastinum til fyrstu umførini í steypakappingini. Bert í tveimum dystum skulu lið úr bestu deildini spæla ímóti hvørjum øðrum**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



*Steypavinnararnir í fjør skulu spæla lokaluppgerð í steypakappingini. GÍ dróg LÍF á heimavølli í øðrum umfari av kappingini um Løgmanssteypið*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Nú er greitt at spæla tvey tey fyrstu umførini í kappingini um Løgmanssteypið, sum er steypakappingin hjá mansliðunum í fótbólti.

Lutakastið var mánakvøldið, og drigið var til bæði fyrsta umfar og annað umfar.

Í fyrsta umfari verða bert fýra dystir, og her vóru tvær lokalar uppgerðir drignar upp úr glasinum. TB skal spæla ímóti Royn, og SÍ skal royna seg ímóti MB.

Vinnararnir av teimum fýra dystunum í fyrsta umfari fara víðari til annað umfar, har øll hini feløgini eisini koma upp í kappingina.

### Tey fremstu fingu heimavøll

Hóast møguleiki var fyri, at tey fremstu liðini í Formuladeildini í fjør skuldu spæla ímóti hvørjum øðrum longu í øðrum umfari, so sluppu hesi feløgini undan hvørjum øðrum.

Meistararnir í B36 skulu spæla ímóti vinnaranum av dystinum ímillum TB og Royn, og HB dróg Sumba/VB á heimavølli. Skála skal somuleiðis hava heimavøll, og tað verður ímóti einum 1. deildarliði – antin FS Vágar 2004 ella AB.

EB/Streymur fekk somuleiðis heimavøll ímóti 1. deildarliði, B71, meðan NSÍ á útivølli skal spæla ímóti antin MB ella SÍ.

### Tveir dystir við fremstu liðunum

Bert í tveimum førum skulu lið í Formuladeildini spæla ímóti hvørjum øðrum í 2. umfari í steypakappingini.

HB fær vitjan av Sumba/VB, meðan uppflytararnir úr B68 fáa vitjan av ÍF.

ÍF var í finaluni í kappingini í fjør, har liðið tapti ímóti GÍ. Steypavinnararnir í fjør drógu í 2. umfari LÍF á heimavølli.

Fyrsta umfarið í kappingini um Løgmanssteypið verður 18. mars, og annað umfar verður 25. mars. Síðani verður drigið um fjórðingsfinalurnar í kappingini, og tær verða spældar Kristi Himmalferðardag 25. mai. Hálvfinalurnar verða spælda 5. og 23. juli, og finalan verður á ólavsøku tann 29. juli.

### Kappingin um Løgmanssteypið

**1. umfar, 18. mars**
TB-Royn
Fram-NÍF
FS Vágar 2004-AB
SÍ-MB

**2. umfar 25. mars**
HB-Sumba/VB
GÍ-LÍF
EB/Streymur-B71
B36-TB ella Royn
KÍ-Fram ella NÍF
SÍ ella MB-NSÍ
Skála-FSV04 ella AB
B68-ÍF

Spældur verður ein dystur, og vinnarin fer víðari í kappingini.

Drigið verður aftur 27. mars.

# Rógvi fekk flúgvandi byrjan

**KR vann um vikuskiftið fyrsta venjingardystin undir leiðslu av nýggja venjaranum Teiti Tórðarson, og Rógvi Jacobsen var í andglettinum**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Spælararnir í íslendska felagnum KR hava vant nógv í vetur, og um vikuskiftið spældu teir fyrsta venjingardystin.

Tað gekk væl hjá føroyska landsliðsspælaranum Rógva Jacobsen í hesum venjingardystinum. Rógvi spældi allan dystin í álopinum hjá KR, og hann skoraði tvey mál í 5-1 sigrinum á Leikni.

Rógvi legði fyri og setti punktum fyri trivaliga sigurin, tí hann skoraði til 1-0 og til 5-1.

Meginpartin av tíðini spældi Rógvi saman við Grétar Ólafur Hjartarson í álopinum, og tað riggaði væl, tí Grétar gjørdi somuleiðis tvey mál í hesum dystinum.

### Nýggjur venjari

Rógvi Jacobsen spældi seinnu hálvu í fjør við danska felagnum SønderjydskE, men nú er hann aftur í íslendska felagnum, og har var nýggja byrjanin hjá honum í øllum førum stak góð.

Rógvi hevur nú spælt 36 dystir fyri KR, og hann hevur gjørt 9 mál.

Venjingardysturin var tann fyrsti við nýggja venjaranum hjá felagnum Teiti Tórðarson, og hann fekk tí góða byrjan í nýggja starvinum heima í Íslandi. Teitur hevur annars virkað sum venjari í útlandinum í fleiri ár.

# Veðrið steðgaði Tromsø

Føroysku útisetarnir strandaðu í Bodø leygardagin, og so vórðu ætlaðu landskappingardystirnir av ongum.

Flogfarið, har liðið hjá Rúna Weihe og Bárði B. Mikkelsen eisini var við, millumlendi í Bodø, tá teir skuldu ferðast til Trondheim. Her gjørdu tekniskir trupulleikar tó, at flogfarið ikki slapp avstað alt fyri eitt. Og tá hann samstundis øtlaði veðrið, varð øll flogferðsla avlýst.

Tí mátti liðið gista í Bodø, og heldur ikki sunnudagin gjørdist talan um nakran dyst. Her taldi skráin annars toppdyst á útivølli móti Kristiansand, men sambandið úr Bodø til Kristiansand er ikki serliga gott, og í samráð við norska flogbóltssambandið varð tí avgjørt, at eisini tann dysturin varð útsettur.

**-mørk**

# HB Cup verður leygardagin

Komandi leygardag skipar HB fyri kapping í innandurafótbólti fyri virki og einstaklingar.

Kappingin verður í høllini á Hálsi í Havn. Hesi seinnu árini hava slíkar kappingar verið serstakliga væl umtóktar, og í HB vóna teir, at undirtøkan til hesa kappingina eisini verður góð.

Spælt verður við lítlum málum, og á hvørjum liði kunnu í mesta lagi verða fimm leikarar. Fýra leikarar eru á vøllinum í senn, og til ber at hava ein eykaleikara. Hvørt liðið hevur loyvi at hava ein leikara, sum í 2005 spældi í antin 1., 2. ella 3. deild.

Bowlinghøllin á Hálsi í Havn letur vinningar til vinnandi liðið.

Tilmelding til kappingina fer fram á tlf. 219555 ella 585300 í seinasta lagi mikudagin, og luttøkugjaldið, sum er 500 krónur, skal gjaldast við dómaraborðið, áðrenn kappingin byrjar.

**tn**